## Úr Løgtinginum



# Dagur fyrispurniganna

*Ófráboðaðir fyrispurningar og atkvøðugreiðslur um fyrispurnigar merktu tingfundin í gjár*

JOHN JOHANNESSEN

Tingfundur nummar 43 hesa tingsetuna, sum varð settur í gjár klokkan hálvgum tvey seinnapartin, var fyri tað mesta merktur av fyrispurningum.

Á dagsskránni fyri fundin vóru 7 mál, og var tað fyrsta teirra ófráboðaðir fyrispurningar.

Tá rundan við ófráboðaðu fyrispurningunum var av, legði løgmaður fram tingmál nummar 101-5/1999, sum er frágreiðing frá løgmanni um uttanlandsmál 1999/2000.

Eftir framløguna vóru aftur fyrispurnigar á skránni. Fyrst skuldi atkvøðast um fyrispurning nummar 100-28/1000 til Signar á Brúnni, landsstýrismann, frá Rúnu Sivertsen, løgtingskvinnu, um Skúlan á Trøðni og Sernámsdepilin. Hesin fyrispurningur varð fráboðaður á fundinum týsdagin.

Fjóðra málið á skránni var atkvøðugreiðsla um fyrispurning nummar 100-19/1999 til Finnboga Arge, landsstýrismann, frá Lisbeth L. Petersen, løgtingskvinnu, viðvíkjandi barnsburðargrunni.

Fimta málið á dagsskránni var fyrsta viðgerð av tingmáli nummar 38/1999, sum er uppskot til løgtingslóg um skyldu arbeiðsgevaranna at boða løntakarunum frá um setanartreytir teirra. Uppskotið legði Hans Pauli Støm fyri tingið vegna Javnaðarflokkin 18. januar í ár.

Næstseinasta málið á skránni var eisini aftur ein fyrispurningur. Talan var nevniliga um svar uppá fyrispurning nummar 100-13/1999 til Jørgen Niclasen, landsstýrismann, frá Tórbirni Jacobsen, løgtingsmanni, viðvíkjandi lóggávu, ið gevur Føroya Landsstýri sera víðar heimildir viðvíkjandi stuðli og veðhaldum á fiskivinnuøkinum. Hesin fyrispurningurin varð fráboðaður 8. desember í fjør.

Seinast á skránni fyri tingfundin í gjár var framløga.



## Jenis formaður

JOHN JOHANNESSEN

Tingformaðurin boðaði á tingfundinum týsdagin frá, at nevndin, ið vald er at viðgera tingmál nummar 27/1999, sum er uppskot til løgtingslóg um løgtingsins umboðsmann, hevur skipað seg við Jenisi av Rana sum formanni og Sámali Petur í Grund, sum næstformanni.

# Áhugamál og trivnaður hjá tí einstaka framíhjárættindi

*Sáttmálin fer saman við »lov om patienters retsstilling« at veita føroyingum stóran tryggleika, eisini tá ið hugsað verður um ivamál og spurningar, sum hava verið frammi seinasta árið viðvíkjandi arvagransking, sigur Anfinn Kallsberg ma. í viðmerkingunum til nýtt uppskot*

ÓLAVUR Í BEITI



Anfinn Kallsberg, løgmaður, legði vegna landsstýrið uppskot fyri tingið í farnu viku, har heitt verður á ríkisstjórnina at seta í gildi fyri Føroyar millumlanda sáttmála frá 4. apríl 1997 um vernd av mannarættindum og menniskjans tign í lívfrøði og læknavísindi (sáttmáli um mannarættindi og lívlæknafrøði).

Í viðmerkingunum verður greitt frá, at Evroparáðið hevur í longri tíð viðgjørt trupulleikar hjá mannaættini ísambandi við framstig, ið gjørd eru innan læknavísindi og lívfrøði. Síðan 1978 hevur Ráðharranevndin í Evroparáðnum samtykt fleiri tilmæli viðvíkjandi ymiskum siðfrøðiligum og løgfrøðiligum spurningum, ið hava víst seg í kjalarvørrinum av menningini av lívlæknafrøðiligu vísindini. Við hesum í huga er avrátt at gera ein heildarsáttmála, ið fevnir um meginreglur um at verja menniskju í sambandi við lívlæknafrøðiliga vísind.

– Danskir myndugleikar hava sett seg í samband við myndugleikarnar her á landi við fyrispurningi, um sáttmálin skal setast í gildi í Føroyum, sigur løgmaður Anfinn Kallsberg í viðmerkingunum.

**Stóran týdning**

– Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum metir, at av tí at sáttmálin ásetir reglur um vernd av mannarættindum og menniskjaligari tign í sambandi við menning og nýtslu av lívfrøði og læknavísindi, fer hann at hava stóran týdning fyri eitt felags verndarstøði fyri borgarar í Føroyum og Evropa sum heild.

– Føroysk staðfesting av sáttmálanum hevur við sær, at føroyskir myndugleikar hava ábyrgd av at skipa føroyska lóggávu/siðvenju samsvarandi ásetingum í sáttmálanum, so at sáttmálin verður hildin. Um ivamál verða, skulu føroyskar rættarreglur tulkast á slíkan hátt, at tær samsvara við sáttmálan.

– Fyri at hesin millumlanda sáttmáli kann verða útinntur í Føroyum, er neyðugt at seta »lov om patienters retsstilling« í gildi í Føroyum. Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum fer at leggja hetta ríkislógartilmæli fyri Løgtingið í tingsetuni.

– Kortini er ikki neyðugt at hava føroyska lóggávu lidna, áðrenn sáttmálin verður settur í gildi. Føroysk lóggáva skal bert verða tilevnað rímiliga tíð eftir, at sáttmálin er settur í gildi, sigur løgmaður m.a. í viðmerkingunum til uppskotið.

# Kvinnurnar á arbeiðsmarknaðinum fíggjarlig byrða

*Hvussu langt eru fyrireikingarnar til barnsburðargrunnin komnar, vil Lisbeth L. Petersen hava at vita frá Finnboga Arge, landsstýrismanni*

ÓLAVUR Í BEITI

Lisbeth L. Petersen, løgtingskvinna fyri Sambandsflokkin, hevur sett Finnboga Arge fyrispurning viðvíkjandi barnsburðargrunninum, og vil Lisbeth L. Petersen hava at vita, hvussu langt fyrireikingarnar eru komnar til barnsburðargrunnin? Og nær kann væntast, at hann verður settur á stovn? Og um landsstýrismaðurin hevur eina ætlan um, hvussu sami grunnur skal fíggjast?

Í viðmerkingunum til hesar tríggjar spurningarnar, sigur Lisbeth L. Petersen, at síðani seinasta løgtingsval hevur javnan verið frammi í fjølmiðlunum, at barnsburðargrunnur skuldi setast á stovn. Í valstríðnum var barnsburðargrunnurin eitt av evnunum, sum so gott sum allir flokkar høvdu á skránni.

– Í fjølmiðlunum seinasta heyst hevur landsstýrismaðurin nevnt, at barnsburðargrunnurin helst skuldi fara at virka frá 1. apríl í ár 2000. Eisini hevur verið nevnt, at ein arbeiðsbólkur skuldi setast at arbeiða við sama spurningi.

**Tørvandi javnstøða**

– Viðvíkjandi teim alment løntu er nú ein skipan galdandi, tá avtala er gjørd um spurningin við sáttmála, sum tryggjar kvinnuni fulla løn, tá hon fer í barnsburðarfarloyvi, men á privata arbeiðsmarknaðinum er støðan ikki hin sama. Í mongum føri er tað arbeiðsgevarin, sum ger av, hvussu málið um barsilsfarloyvi verður umsitið. Fíggjarliga orkan hjá arbeiðsgevara kann vera avgerandi fyri, hvørjar sømdir kvinnan, sum verður við barn, fær. Hetta sást og



eru dømi um, tá kreppan í nítiárunum leikaði harðast á, og kvinnurnar á arbeiðsmarknaðinum vórðu mettar sum ein fíggjarlig byrða fyri summi. Hetta er órímilig og óvirðilig støða og samstundis eitt dømi um tørvandi javnstøðu.

Lisbeth L. Petersen vísur eisini til ársfundin í Íslandi í juni mánaði, tá 8 rekommandatiónir vóru gjørdar við støði í samtyktunum á ráðstevnuni.

– Tann 18 november vórðu somuleiðis allar rekommandatiónirnar samtyktar í Løgtinginum við 27 atkvøðum fyri og 1 ímóti. Tá varð atkvøtt um allar undir einum, sigur Lisbeth L. Petersen í viðmerkingunum.

# Rúna spyr av nýggjum

*Rúna Sivertsen var ikki nøgd við 5 av svarunum hjá Signari á Brúnni, landsstýrismanni, og tí hevur hon spurt av nýggjum*

ÓLAVUR Í BEITI

Tann 18. januar svaraði Signar á Brúnni, mentamálaráðharri, nøkrum spurningin frá Rúnu Sivertsen viðvíkjandi skúlanum á Trøðni, men Rúna Sivertsen var ikki nøgd við 5 av svarunum hjá mentamálaráðharranum.

Nú hevur Rúna Sivertsen so sett mentamálaráðharranum hesar 5 spurningar av nýggjum, tó í eitt sindur broyttari útgávu.

Rúna Sivertsen vil hava at vita frá Signari á Brúnni, hvørjum lógargrundarlagi Skúlin á Trøðni var undir í árunum 1990 - 1998? Hvat var lógagrundarlagið fyri at leggja Skúlan á Trøðni og Sernámsfrøðiligu Ráðgevingina saman? Er Sernámsdepilin ein almennur undirvísingarstovnur undir landinum? Hevur skúlin í Sernámsdeplinum skúlastjóra eins og aðrir skúlar, og hvørjar heimildir hevur hesin? Og í fimta spurninginum vil Rúna Sivertsen hava at vita, hví barnagarsdeildin í Sernámsdeplinum er niðurløgd sum viðgerðarstovnur, og viðgerðarskyldan flutt í almannaverkið?





# Umsóknirnar strandaðar

*Aðalstýrini bøla omaná umsøknum um at tryggja løgfrøðingum og búskaparfrøðingum hægri løn*

EYÐUN KLAKSTEIN

Almennu Føroyar brúka ikki øll síni vápn í kappingini um løgfrøðingar og búskaparfrøðingar.

Hóast eitt ár er gingið, síðani tað almenna fekk møguleikan at lata serliga skikkað fólk fáa hægri løn, hevur eingin enn fingið ágóðan av hesum.

– Eldur er í húsunum, men tað almenna ger einki. Tað hevur bara sett seg niður at rópa, at eldur í, heldur Bergur Berg, formaður í Búskapar- og Løgfrøðingafelagnum.

14. februar í fjør gjørdu Lønardeildin í Fíggjarmálastýrinum og Búskapar- og Løgfrøðingafelagið nýggjan 2 ára sáttmála. Í hesum sáttmála fekk tað almenna møguleikan at seta búskapar- og løgfrøðingar sum deildarleiðarar ella serfrøðingar.

Hetta hevði havt við sær hægri endaløn til ein part av búskapar- og løgfrøðingunum, og tað kundi tí verið lokkubitin, sum kundi fingið fleiri av teimum royndu fólkunum at støðast í almennum starvi.

Men enn er eingin settur eftir nýggja sáttmálanum, og tað heldur formaðurin í Búskapar- og Løgfrøðingafelagnum er viðvirkandi til, at fólk rýma úr almennum starvi.

– Fólk, sum koma heim við akademiskari útbúgving, ætla ikki at ríka seg upp, og tí nýtist tað almenna ikki at bjóða fult so nógva løn, sum tey gera í øðrum londum, men tað hevði hjálpt nógv, um tað almenna vísti vilja til at gera nakað fyri fólk í almennum størvum. At tey merktu, at tað almenna veruliga setti prís á tey, sigur Bergur Berg.

– Men samstundis sum útbúgvið fólk rýmir, ger eingin brúk av møguleikanum at seta hesi fólk sum deildarleiðarar ella serfrøðingar. Fleiri ynskja at verða sett í hesi størv, men eingin av umsóknunum til aðalstýrini er enn endaliga viðgjørd. Málsviðgerðin tekur ár, og tað skilji eg væl, at fólk ikki tíma at bíða eftir.

**Ætlaðu at seta 16 serfrøðingar**

Leiðarin á Lønardeildini hjá Fíggjarmálastýrinum, Thomas Magnussen, sigur, at teir onga umsøkn hava fingið frá aðalstýrunum um at seta fólk sum deildarleiðarar ella serfrøðingar.

Sambært einum rundskrivi, sum var sent øllum aðalstýrinum 1. oktober í fjør, var upplýst um nýggja møguleikan hjá aðalstýrinum at tryggja skikkaðum fólki hægri løn.

Tað eru teir einstøku stovnarnir, sum skulu senda aðalstýrinum, sum teir hoyra til, umsókn, tá teir vilja seta fólk sum deildarleiðarar ella serfrøðingar. Síðani skal aðalstýrið viðmæla hetta til Lønardeildina í Fíggjarmálastýrinum, sum so skal samráðast við fakfelagið.

Í rundskrivinum varð sagt, at best var um umsóknirnar vóru sendar aðalstýrunum áðrenn hálvan oktober, soleiðis at málini kundu verða avgreidd í oktober mánaði. 12. oktober í fjør boðaði landsstýrismaðurin við fíggjarmálum, Karsten Hansen, frá, at at vildi játtað, at tað vórðu upprættað 16 serfrøðingastørv.

Hetta gjørdi hann partvís fyri at tryggja, at møguleikin í sáttmálanum við Búskapar- og Løgfrøðingafelagið kundi førast út í lívið, og partvís fyri at seta kvotu á tali á fulltrúðum sum kundu setast í serfrøðingastarv.

Men meira enn tríggjar mánaðir seinni er eingin umsókn komin til Lønardeildina hjá Fíggjarmálastýrinum.

– Vit ætlaðu veruliga at seta fólk í hesi størv, men vit hava onga umsókn fingið, og tað kann kanska skiljast sum, at tørvurin á hesum størvum er ikki so stórur, sigur Thomas Magnussen, leiðari á Lønardeildini í Fíggjarmálastýrinum.

Sambært Bergi Berg eru fleiri slíkar umsóknir sendar til aðalstýrini, men har eru málini steðgað.

**Bygnaðurin ein trupulleiki**

Sosialurin skrivaði í leygardagsblaðnum, at klóku høvdini rýma frá tí almenna, tí tey fáa betri treytir aðrastaðni. Millum annað hægri løn og betri møguleikar fyri at útbúgva seg víðari.

Bæði stjórin á Hagstovu Føroya og aðalstjórin í Fíggjarmálastýrinum søgdu, at kappingin hjá tí almenna er vónleys, tí ráðini eru ikki til at bjóða búskapar- og løgfrøðingum somu løn, sum onnur gera. Til dømis tað privata í Føroyum og grønlendska umsitingin.

Seinasta dømið um vælútbúgvið fólk, sum rýmir úr einum almennum starvi, er Magni Laksafoss, cand. polit, sum seinastu tvey árini hevur starvast á Hagstovu Føroya. Hann fer í mars mánaði í starv hjá Grønlands Statistik, har hann skal gera sama arbeiðið, sum hann hevur gjørt á Hagstovuni. Men hann fær hægri løn og betri møguleikar fyri at útbúgva seg víðari.

Magni Laksafoss er ein av teimum, sum hevur biðið um at verða settur sum ráðgevi ella deildarleiðari, men hann hevur einki endaligt svar fingið um hetta. Millum annað tí hevur hann tikið av tilboðnum úr Grønlandi.

– Eg vil ikki gera viðmerkingar til hetta ítøkiliga málið, men eg skilji væl fólk, sum taka av einum betri tilboði, tá tey ikki kunnu fáa svar uppá teirra ynski um at verða sett sum deildarleiðarar ella serfrøðingar, sigur Bergur Berg.

– Viðgerðin av hesum málum er alt ov langdrigin og stirvin. Fólk blíva troytt av starvinum hjá tí almenna, tá tey uppliva trekleika, vantandi vilja og vantandi hugflog, sigur Bergur Berg.

Leiðarin á Lønardeildini í Fíggjarmálastýrinum heldur, at bygnaður av almennu umsitingini kann verða ein trupulleiki í hesum málinum.

– Áður var nógv styttri teinur millum stovnarnar og Lønardeildina, men nú skal alt umvegis aðalstýrini, og tað kann verða ein trupulleiki, at hesi málini skulu ígjøgnum so nógv lið, sigur Thomas Magnussen.



*Aðalstýrini bøla omaná umsóknunum um at tryggja búskapar- og løgfrøðingum hægri løn. Mynd: Álvur Haraldsen*

RIMMAR ÚTSØLA
byrjar fríggjadagin 28. jan. kl. 10.00 við hópin av niðursettum vørum
BLUSUR, BUKSUR OG NIÐURDEILAR FRÁ KR. 100.-
TAK 2 PLØGG -GJALD FYRI 1
Eisini hava vit nógv góð tilboð av meturvørum, restum og tilhoyri m.a. "Overlock-trá" (5000 m.) fyri 30.- kr.
Opið er: Mánadag-hósdag kl. 10.00-17.30
Fríggjadag kl. 10.00-18.00
Leygardag kl. 10.00-13.00
SONJA DESIGN
Stoffalág 41 • 100 Tórshavn • Tel. 314979
(Oman fyri Lágargarð)
Sosialurin - 311820